Fylgiskjal 6

**Kristvør H. Poulsen**

**Fra:** Tróndur Gilli Leivsson
**Sendt:** 4. september 2018 16:57
**Til:** Heilsu- og innlendismálaráðið
**Emne:** Viðv.: hoyringssvar frá Búnaðarstovuni um ætlaðar broytingar í ávikavist Ll. um náttúrufriðing, Ll. um kærunevnd í lendismálum og Ll. um umhvørvisvernd.

Heilsu- og innlendismálaráðið
Eiragarður 2
100 Tórshavn

**Viðv.: hoyringssvar frá Búnaðarstovuni um ætlaðar broytingar í ávikavist Ll. um náttúrufriðing, Ll. um kærunevnd í lendismálum og Ll. um umhvørvisvernd.**

Búnaðarstovan takkar fyri at hava fingið uppskotini til broytingar í ávikavist Ll. nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing, Ll. nr. 110 frá 13. desember 20106 um kærunevnd í lendismálum og Ll. nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd til hoyringar.

*Búnaðarstovan hevur hesar viðmerkingar til ætlaðu lógarbroytingarnar:*

Viðv. Ll. um náttúrufriðing:

- Ætlaðu broytingarnar í fyrisitingarliga partinum av Ll. um náttúrufriðing er tiltrongdar, og hesar broytingarnar eiga at verða framdar, óansæð hvørja politiska lagnu, ið uppskotið um Ll. um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni – Náttúrumargfeldislógin annars fær.
- Búnaðarstovan tekur tí undir við, at ávikavist sýsluskipaða Friðingarnevndin eins og Yvirfriðingarnevndin verða avtiknar, og heimildirnar latnar til landsstýrismannin í náttúrumálum at fyrisita.
- Enn er púra óvist, hvørja politiska lagnu, ið uppskotið til Ll. um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni – Náttúrumargfeldislógin fer at fáa. Tí skal Búnaðarstovan mæla til, at núverandi Kapittul II í galdandi Ll. um náttúrufriðing verður varðveittur í lógini, til nýggj og nøktandi lóggáva er fingin í staðin, soleiðis at fullgóð lóggáva alla tíðina er á økinum at arbeiða eftir. Hetta merkir, at § 1, nr. 10, í lógaruppskotinum verður rættað samsvarandi hesum til at ljóða: *"**10.** III. partur, IV. partur og V. partur verða strikaðir."*
- Búnaðarstovan skal somuleiðis mæla til at varðveita yvirskriftina fyri kapittul I. Hetta merkir, at § 1, nr. 1, í lógaruppskotinum verður strikað.
- Í viðmerkingunum til lógaruppskotið, undir "Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum", verður sagt ávikavist: 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna - *Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna;* 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum - *Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum;* 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir - *Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.*
- Búnaðarstovan er ikki samd í útsagnunum endurgivnar omanfyri. Grundgevingin fyri hesum sjónarmiði er hon, at núverandi lóggáva hevur sína fyrisitingarligu málsgongdarbyrjan hjá teimum sýsluskipaðu, og sostatt staðbundnu og staðkendu, Friðingarnevndunum. Sambært lógaruppskotinum verður hendan fyrisitingin í framtíðini skipað hjá einum fulltrúa á Umhvørvisstovuni, staðsettum á Argjum. Búnaðarstovan er tí av teirri greiðu fatan, at ætlaða lógarbroytingin fær avleiðingar fyri nærdemokratiið og soleiðis eisini avleiðingar, sentralisering, fyri m.a. borgarar, kommunur og vinnulív úti kring landið.
- Náttúrumál eru soleiðis háttaði, at hesi hava ávikavist bæði eina fakliga stevnu, samstundis sum tey eisini fevna um ein fólksligan hugburð til evnið. Skal góð náttúruumsiting eydnast í verki í samfelagnum, má hon vera kjølfest í fólkinum við góðari medeigarakenslu; har røkkur eitt fyrisitingarstýri ikki einsamalt á mál. Tí er Búnaðarstovan av teirri greiðu fatan, at alneyðugt er at tryggja landsstýrismanninum heimild til at skipa sær eitt fólksligt ráð ella nevnd til at kunna ráðføra seg við, og sum eisini hevur heimild til av sínum eintingum at taka mál upp til viðgerðar við myndugleikarnar.
- Í aðrar mátar hevur Búnaðarstovan ongar viðmerkingar.

Viðv. Ll. um kærunevnd í lendismálum:

- Virkisøkið hjá umskipaðu kærunevndini tykist vera ein hóskandi samanseting.
- Førleikakrøvini til limirnar í nýskipaðu kærunevndini tykjast hóskandi.
- Í aðrar mátar hevur Búnaðarstovan ongar viðmerkingar.

Viðv. Ll. um umhvørvisvernd:

- Í § 1 er ein slagfeilur komin í árstalinum (skal vera 1988 og ikki 1998).
- Í aðrar mátar hevur Búnaðarstovan ongar viðmerkingar.

Blíðar heilsur


***Tróndur Leivsson, stjóri***

Búnaðarstovan
Frammi í Dal 166, FO-410 Kollafjørður
☎: Avgr.: +298 47 90 00
☎: Fartlf.: +298 29 90 10
T-postur: tronduri@bst.fo
WWW.BST.FO



***Hugsið um umhvørvið, áðrenn hesin t-postur verður skrivaður út***


---

**Fra:** Heilsu- og innlendismálaráðið
**Sendt:** 13. august 2018 15:54
**Til:** Føroya Fuglafrøðifelag <fuglafrodifelagid@gmail.com>; Almannamálaráðið <amr@amr.fo>; Bóndafelag Føroya <sigert@bondi.fo>; Búnaðargrunnurin <bg@bg.fo>; BST Postur <bst@bst.fo>; Suni Petersen <SuniP@us.fo>; Ferðavinnufelagið <birita@industry.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; FNU <fnu@fnu.fo>; Friðingarnevndin fyri Eysturoyar sýslu - Jacob Vestergaard, form <TVE004@politi.dk>; Friðingarnevndin fyri Streymoyar, Sandoyar og Vága sýslu <LFM002@politi.dk>; friðingarnevndin fyri Suðuroy <JAV001@politi.dk>; Fróðskaparsetur Føroya <setur@setur.fo>; Froskmannafelagið <christiansen.david@gmail.com>; Føroya ferðaleiðarafelag <ferdaleidari@gmail.com>; Føroya Kommunufelag <kf@kf.fo>; Føroya Kærustovnur <fks@fks.fo>; Føroya landfúti <politi@politi.fo>; Føroya Ríðingafelag <hansenhallur@gmail.com>; Føroya Síliveiðufelag <andrias@joensen.fo>; Føroya skótaráð <scout@scout.fo>; 'hav@hav.fo' <hav@hav.fo>; Jarðfeingi - Postur <Jardfeingi@jardfeingi.fo>; Landsverk <lv@lv.fo>; Lívfrøðingafelagið <livfrodingafelag@gmail.com>; Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; Mentamálaráðið <mmr@mmr.fo>; Ringrás <ringras@protonmail.com>; Samferðslumálaráðið <smr@smr.fo>; 'sev' <sev@sev.fo>; Michael Jacobæus <MichaelKjollerJ@us.fo>; 'Sorinskrivarin í Føroyum' <post@sorinskrivarin.fo>; savn <savn@savn.fo>; us <us@us.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; 'Vinnuhúsið' <industry@industry.fo>; Visit Faroe Islands <info@visitfaroeislands.com>; 'jallur53@gmail.com' <jallur53@gmail.com>; LUM Postur til Stovnin <lum@lum.fo>; Heilsufrøðiliga starvsstovan <hfs@hfs.fo>; Biofar - høvuðsmail <biofar@savn.fo>; fiskaaling@fiskaaling.fo; h-ludvig@olivant.fo
**Emne:** Til ummælis: broyting í løgtingslóg um náttúrufriðing, broyting í løgtingslóg um kærunevnd í lendismálum og broyting í løgtingslóg um umhvørvisvernd

Góðan dagin

Hjálagt verður sent til ummælis:

1. Uppskot til broyting í løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing
2. Uppskot til broyting í løgtingslóg nr. 110 frá 13. desember 20106 um kærunevnd í lendismálum
3. Uppskot til broyting í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd

Tey trý broytingaruppskotini hanga í stóran mun saman við uppskotinum til løgtingslóg um fyrisiting av margfeldinum í tí føroysku náttúruni, sum varð send til hoyringar tann 6. apríl 2018.